HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Sumbiar Kommuna
Í Kerinum 27
970 Sumba

21. november 2016
**Mál**: 16/01293-2
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

*Góðkenningarskriv*

**Viðvíkjandi broyting í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Sumbiar kommuna í skrivi, dagfest 10. desember 2015, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu til góðkenningar.

Tað snýr seg um smærri broytingar, dagføringar og rættingar, so at byggisamtyktin skal vera í samsvari við tað, sum økini verða brúkt til.

Broytingarnar hava ligið alment frammi frá 20. oktober til 10. november 2015. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 1. desember 2015, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 26. apríl 2016, mælt til at broytingarnar verða góðkendar, sí viðmerkingarnar frá Býarskipanarnevndini.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini og vísandi til § 4 í býarskipanarlógini verða broytingarnar í byggisamtyktini góðkendar, soleiðis sum Býarskipanarnevndin mælir til í ummælinum, dagfest 26. apríl 2016.

Hjálagt rættaður byggisamtyktartekstur og kortskjal fyri Sumba, Lopra, Akrar, Akraberg og Víkarbyrgi við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Mint verður á, at hóast Heilsu- og innlendismálaráðið hevur góðtikið broytingarnar í byggisamtyktini fyri Sumbiar kommunu eftir býarskipanarlógini, so fríðtekur tað ikki kommununi at fáa til vega møguliga onnur loyvir, eitt nú frá friðingarmyndugleikanum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Ólavur J. Hansen
fulltrúi

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo